Atlantic Brokers Ltd

## Stál línuskip

við loyvum, verður lýst til sølu um hóskandi boð fæst.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tel.: 312238 / 212238
sc@atlantic-brokers.com
www.atlantic-brokers.com

Atlantic Brokers Ltd

## Útróðrarbátarnir

NORÐBERG (bólkur 4A og ELSA (bólkur 5) við loyvum, til sølu um hóskadi boð fæst.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tel.: 312238 / 212238
sc@atlantic-brokers.com
www.atlantic-brokers.com

# Reyði Krossur Føroya

**Leygardagin 25. mars 2006**
kl. 10.00: Handil við brúktum klæðum letur upp
Kl. 10.30: Framsýning - PUTLARA - arbeiðir
Kl. 11.00: Tilhaldið fyri heimleys og misnýtarar er upplatið
Kl. 15.30: Aðalfundur

Limagjaldið: kr. 150,- fyri húski og einstaklingar. kr. 400,- fyri feløg/stovnar

**Reyði Krossur Føroya**
www.redcross.fo

# Adressur í Porkeri

Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur, er adressuskráin fyri **Porkeris kommunu** góðkend.

Skráin er almenn og tøk á www.matrikul.fo

**Landsadressuskráin**
Boks 327 · Tlf. 357900 · Fax 357901
FO-110 Tórshavn
www.matrikul fo – post@matrikul.fo

## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsu-frøðiliga starvsstovan tann 17. februar 2006, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Toskaalistøðina hjá P/F Faroe Cod Farm í Hvalba**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvs-stovuni. Avgerðin kann kærast til lands-stýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøði-ligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsu-frøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**




SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

Starvslýsing

# Bókhaldari

Fyri ein av kundum okkara í Kollafirði verður søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Starvið, sum er eitt fulltíðar-starv, fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði.

Talan er um eitt avbjóðandi og áhugavert starv, sum í fyrsta umfari er tíðaravmarkað til eitt ár.

**Umsøkjarin**
Tann, sum settur verður, skal hava kunnleika til bókhald, kunna arbeiða sjálvstøðugt og annars verða fyrikomandi.

Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision er ein fyrimunur, men eingin treyt.

Lønin verður sett eftir avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal send-ast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 31. mars 2006.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Bjarna Rasmussen ella Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

TEAM85



# BÚMERKJAKAPPING

Kommunustýrið á Viðareiði hevur samtykt at skipa fyri kapping um búmerki til kommununa.
Búmerkið skal, á einfaldan og beinraktan hátt lýsa virksemi hja kommununi. Tað kann hava litir men skal eisini kunna nýtast á svørtum/hvítum prenti.

Lýsing av kommununi ið kann gera tað einfaldari at gera búmerkið:
Ein bygd, tann norðasta í Føroyum, 350 fólk, fjøll í suður og norð, hav til eystur og vestur, høvuðsvinna er fiskivinna.

Uppskot skulu vísa búmerkið í ymiskum støddum og uppsetingum við dømum um samanseting av búmerki og navni hja kommununi, harafturat lúka faklig krøv til prenting og myndaframleiðslu.

Kommunustýrið tekur støðu til innkomin uppskot. Tað verður latin ein virðisløn uppá 20.000 kr. fyri tað uppskotið kommunustýrið metir verða best. Metir Kommunustýrið ikki, at nakað hóskandi uppskot er komið, skilar kommunustýrið sær rætt til ikki at lata nakra virðisløn.

Uppskot skulu verða kommununi í hendi seinast 1. mai 2006, í afturlat-num brævbjálva við navni og framerki um búmerkjakapping og sendast til:
**Viðareiðis kommunu**
**FO-750 Viðareiði**

**VIÐAREIÐIS KOMMUNA**
FO-750 Viðareiði · Tel 451083
Fax 451094 · vid.kommuna@kallnet.fo